# Størsta timburarbeiðið í Føroyum í ein mansaldur



*Snotiligt er gamla træskipið vorðið*

SKIP
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Gamla træskipið Thorshavn er komið út úr høllini á Tórshavnar Skipasmiðju, aftan á størsta timburarbeiðið í Føroyum í ein mansaldur. Arbeiðið við at skifta dekk, tak á stýrihúsinum, lúnning og mangt annað hevur verið sera umfatandi. Eisini er allur skrokkurin eftirhugdur, og har ábøtur eru neyðugar eru tær gjørdar.

Maskinan er somuleiðis eftirhugd, og allur streymur umborð er lagdur av nýggjum, umframt nógv annað. Tórshavnar Skipasmiðja hevur miðjað í móti at fáa skipið liðugt til Kongavitjanina, og tað fer at eydnast. Skipið spælir tó ikki nakran leiklut í sjálvari vitjanini, men fer at liggja í Vágsbotni, tá tey kongaligu eru har.

Væntandi verður skipið sjósett mánadagin. Tað skilst at samlaði kostnaðurin fyri umvælingingina er yvir 4 milliónir. Thorshavn er smíðað í 1941. Hóast skipið hevur havt hampiligar umstøður sum so, var ein høvuðsumvæling tiltrongd.



*Væl av fólki var við til tiltaki »Kom og gakk« í Havn leygardagin*

## Kom og gakk gekk væl

GONGUTÚRUR
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Fitt av fólki var savnað á Vaglinum, tá tiltakið "Kom og Gakk" varð sett seinnapartin leygardagin. Borgarstjórin, Heðin Mortensen hevði í sambandi við tiltakið latið seg í gonguklæði, og fór sjálvur við at ganga. Fólk kundu velja millum fimm ymiskar gongutúrar, alt eftir huga, møguleikum og evnum.

Kunningarstovan og Tórshavnar kommuna skipaðu fyri gongudegnum. Ingigerð á Trøðni leiðari á kunningarstovuni segði við portalin, at tiltakið er skipað soleiðis, at øll fáa verið við, og hon gleddist um góðu uppmøtingina. Hóast veðrið var væl verri í ár enn í fjør, vóru næstan líka nógvir luttakarar


COROLLA 25

TOYOTA




Corolla 25 diesel

Til at hátíðarhalda tey 25 árini, Reyni Service hevur umboða Toyota í Føroyum, bjóðar Reyni Service eitt serstakt føðingardagssnið av Toyota Corolla diesel. Sniðið hevur heitið Corolla 25 diesel og sjáldsama væl upplagdi motorurin, stendur einki aftan fyri bensin útgávunar. Haraftrat megnar hann samfullar 17,2 km/l við býarkoyring!

Tilboðið er galdandi so leingi Corolla 25 diesel er á goymslu.

Toyota Corolla 25 fæst fyri **kr. 210.000,-**

**Corolla 25 diesel er útgjørdur við hesi eykaútgerð:** Gáttir á síðunum og pyntilistar aftan, tokulyktir, aircondition, alu-felgur, leðurróður við fjarstýring til radio, gearknøtt úr leðri við chromi og "Luna"-inntrekk.

Corolla 25 diesel kostar kr. 222.000,-, um bilur er í býti.

TEAM85

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F